## DAGSINS MEINING

# Skilatala á Christiansborg

Fríggjadagin í síðstu viku segði Høgni Hoydal á Fólkatingi, at hann als ikki tók undir við donsku luttøkuni í Irak krígnum. Hann segði seg at hava trupult við at skilja, hví danska stjórnin ikki boðar frá, at Irak kríggið var eitt mistak, og at danska stjórnin tí ikki longur ynskir at luttaka í sokallaðu samgonguni, sum hevur hersett Irak. Víðari gjørdi Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, vart við, at danski staturin er farin inn í eitt kríggj, sum hevur kostað tíggjutúsundavís av sivilum mannalívum á einum beinleiðis skeivum grundarlagi og við einum sera lítlum meiriluta. Hann metti hetta at vera ein trupulleika, sum danska Fólkatingið og danska fólkaræðið átti at viðgera. Høgni Hoydal segði eisini, at Føroyar og Grønland vórðu drigin inn í eitt kríggj, sum londini bæði eru ímóti.

Vit kunnu ikki annað enn taka undir við fólkatingsmanninum í hesum máli. Vit ávaraðu frá fyrsta degi løgtingið ímóti at stuðla danska luttøku í krígnum í Irak. Vit hava her fleiri ferðir gjørt vart við, at tað er meira enn løgið, at Danmark fer upp í eitt kríggj í Miðeystri. Hetta hevur einki at gera við stuðul til Saddam Hussein. Vit hava ferð eftir ferð ávarað móti hesum ræðuliga einaræðisharra, men vit hava samstundis víst á, at innrás í Irak var ikki loysnin at sleppa av við hann. Danmark hevur als ongar siðvenjur fyri at føra kríggj, og tað virkar heilt margháttligt, at hetta lítla, dámliga og friðarliga landið er farið at senda herfólk til annað land í einum heilt ørðum heimsparti.

Hetta, at Danmark er farið í hernað, uttan at Danmark ella nakar annar partur av ríkisfelagskapinum eru álopin ella hótt er eitt so álvarsamt brot á tann uttanríkis- og verjupolitikk, sum Danmark hevur rikið í meira enn hundrað ár, at tað sjálvsagt er rætt at mótmæla. Føroya løgting átti sjálvsagt eisini at nýtt høvið, nú Fólkatingið skuldi gera av, um danska stjórnin skuldi fáa loyvi at halda fram við at hava danskar hermenn í Irak. Kríggið í Irak hevur við sær stórar líðingar fyri tjóðirnar, ið har búgva. Sum í øllum kríggjum eru kvinnur, børn og gomul offrini. Hartil eru stórir partar av mannaættarinnar felags mentanararvi týndir av krigsatgerðum. Ein onnur fylgjga er, at Irak nú er vorðið eitt reiður hjá altjóða yvirgangskroppum- og felagsskapum. Kríggið í Irak er við at gerast ein sorgarleikur eisini fyri USA og Bretland og hartil verður tað ein politisk vanlukka fyri Bush og Blair. Her gevst eingin hernaðarlig loysn. Tað er bert ein politisk loysn, sum kann fáa enda á tí ræðuligu støðuni í Irak. Hesa loysn má altjóða samfelagið við ST á odda finna. Tað hevði sømt seg betri fyri eitt land sum Danmark at virka á altjóða pallinum fyri eini politiskari loysn í Irak enn at sent ungar danir út til ræðuleikarnar í Irak. Mótmæli fólkatingsmansins var tí skilatala, sum øll demokratisk hugsandi og friðarhugað fólk sjálvsagt eiga at taka undir við.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til blaðgrein hjá Heina í Skorini

JENIS AV RANA
Løgtingsmaður



**Í bløðunum leygardagin roynir omanfyrinevndi at prógva, at í sakini um serrættindi til tey »samkyndu« er talan um tað bera bluff frá »neisíðuni«. Hetta byggir hann á eina hugsan, sum eisini onnur hava róð framímóti, tó at ongin áður hevur roynt at grundgivið stórvegis fyri hesi hugsan, sigur Jenis av Rana**

Harafturat skuldsetur hann Bill Justinussen fyri at villleiða í sama máli, tá hesin førir fram at málið í veruleikanum viðvíkur homosexualiteti.

Orðarætt sigur Heini.:

*... tað verður lagt fram sum um, at samkynd nú skulu takast fram um allar aðrar samfelagsbólkar, og um tú endurtekur eina lygn nóg ofta, gerst hon til seinast sannleiki...*

Høvdu Finnur og Anita ongar viðmerkingar fest við lógaruppskot teirra, var greinin hjá Heina ( og tøkkin frá Finni ) tann beri sannleiki. Men í viðmerkingum teirra, frá byrjan og til enda, gera tey aftur og aftur greitt, at málið snýr seg um at vinna teim " samkyndu" ávís rættindi. Bert einstakar ferðir verða aðrir samfelagsbólkar nevndir, og tá bert sum generellar viðmerkingar. Til sammetingar verða tey " samkyndu" nevnd umleið 20 ferðir í greinini, og tá í sambandi við royndir uppskotsstillaranna at sannføra um hvussu neyðugt er við serverju fyri hesi.

Niðanfyri loyvi eg mær at endurgeva tvey brot úr viðmerkingum uppskotsstillaranna:

*... 1987 varð samtykt á Fólkatingi, at mannamunsgreinin (antidiskriminasjónsgreinin) 226 b skuldi víðkast soleiðis, at hon eisini fevndi um "kynsliga orientering". Tað var ikki fjalt fyri nøkrum, at høvuðsorsøkin til broytingaruppskotið var støðan hjá samkyndum í Danmark tá.*

*... uppskotsstillararnir meta í einum og øllum, at málið snýr seg ikki um nakað kynsligt sum so, ella um hvør kynshugur er rættur ella skeivur, málið snýr seg um at tryggja einum bólki nøkur mannarættindi. Málið snýr seg um, at vit í Løgtinginum eiga at verja ávís fólk móti mannamuni og happing. Nú eru tey nógv, sum siga, at tey samkyndu í Føroyum eru ikki fyri ágangi, tey verða ikki happað, og at mannamunur verður ikki framdur mótvegis teimum. Hesum eru uppskotsstillararnir ikki samdir í. Og kann millum annað vísast á ymist, sum hendi í samband við, at samkynd skipaðu fyri ráðstevnu í Havn í august í ár. Um danska versjónin av grein 226 b í revsilógini var galdandi í Føroyum tá, vóru fleiri enn eitt av átøkunum, sum vórðu framd móti teimum samkyndu, revsiverd...*

Eg fari at heita á áhugaði um at fara inn á heimasíðu Løgtingsins – www.logting.fo – og har undir tingmál lesa uppskot nr. 21- og allar viðmerkingarnar til hetta. Viðmerkingar, sum siga eina aðra søgu enn ta, sum nøkur nú royna at boða.

# Hamas viðurkennir IKKI Ísrael

JÓN ELLENDERSEN



Tað kenst eitt sindur løgið: Júst áðrenn eg fór undir at lesa Sosialin, hevði eg sæð ein Hamas leiðara í SvF hildið uppá, at Hamas fór ***aldri*** at góðtaka Ísrael ella at liva lið um lið við ísraelar. Men inni í Sosialinum stendur at lesa: Hamas tykist sinnaður at viðurkenna Ísrael!

Riad Welwel, Hamas talsmaður, sum lýsir seg sjálvan sum ein modernaðan vinnulívsmann sigur tað, sum Hamas í veruleikanum sigur: – Allar avtalur við Ísrael eru eitt mistak og skulu ógildast. Vit í Hamas eru ímóti hesum avtalum!

So, hvør hevur rætt? Árni Joensen í Sosialinum ella Hamas talsmaðurin í SvF og Hamas talsmaðurin, Riad Welwel?

Tað er ikki fyrstu ferð, at vesturheimurin letur seg tøla av, at m. a. Hamas borðreiðir við einum heldur borðbarari boðskapi vestureftir, meðan boðskapurin í Palestinu er egghvassur: »Vit viðurkenna ikki Ísrael!« Ja, so greiður og fíggindasinnaður er boðskapurin hjá Hamas, at Fatah rørslan, sum Arafat var ein av stovnarunum av, tekur frástøðu frá Hamas tí teir óttast fyri, at Hamas fer at beina fyri friðarsamráðingunum fyri tíð og ævir!

Ikki tí, sama boðskap sum Sosialurin ber, stendur at lesa í Politiken, sum endurgevur The Guardian. Men, tað er eingin loyna – og tað sigur Welwel sjálvur – at Danmark altíð hevur stuðlað palestinum treytaleyst. Welwel sigur m.a.: – *Eg koyri bil og surfi á internetinum eins og øll onnur. Hamas er ein nýmótans felagsskapur, sum vesturheimurin ikki skal ivast í at stuðla. Tí eggi eg m.a. Danmark at halda á við at stuðla palestinska fólkinum, eisini um Hamas vinnur valið!*

Eg kann minna á, at hóast stjórnarskipanarlógin hjá PLO hevur eina »vesturlenska útgávu«, har grein 10 er strikað, so hevur PLO í Palestinu *ikki* strikað grein 10 í stjórnarskipanarlógini. Í grein 10 stendur millum annað, at Ísrael ikki er eitt land, at ísraelar ikki eru eitt fólk og, at PLO gevst ikki fyrr enn Ísrael er rikið í havið.

Trupulleikin við okkum vesturlendingum er, at vit ikki kenna so frægt til arabiska mentan, at vit skilja, at *tað í arabiskum – og serliga muslimskt stýrdum – londum ikki er skeivt at lúgva, tænir tað antin arabiskum ella islamskum áhugamálum.* Sjálvur Muhammed sigur, at tað er *rætt at lúgva fyri vantrúnum, tá tað tænir Islam!*

So kann Sosialurin meta um, hvørt tað er Sosialurin ella The Guardian, sum siga sannleikan ella tað eru teir báðir talsmenninir hjá Hamas.

*Keldur: SvF; Politiken; Kristeligt Dagblad, The Guardian, Viðmerkingar til Koranina*

*jonel@kallnet.fo*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.